Greiðari reglur fyri skøkjulevnaði í Føroyum

– Vit eiga at umhugsa eisini at revsa tey, sum keypa tænastur frá skøkjum, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður

SKØKJULEVNAÐUR
Áki Bertholdsen

Føroyingar eiga at vera við í altjóða tiltøkum, sum kunnu forða fyri kynsligari misnýtslu og handli og sexhandli sum heild.

Tað heldur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum.

Í Løgtinginum í gjár skuldi hann svara nøkrum spurningum, sum Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri miðflokkin hevur sett honum um striptease og skøkjulevnað í Føroyum.

Beinleiðis orsøkin til, at Løgtingsmaðurin reisir spurningin, er eitt blað, sum HB sendi í hvørt hús í høvuðsstaðarøkinum á Ólavsøku, har lýst varð við Striptease í einum klubba í Havn.

Høgni Hoydal vísir á, at so leingi, vit ikki hava yvirtikið málsøki, er talan um danskt ábyrgdarøki burturav og landsstýrið hevur hvørki innlit í upplýsingar ella ávirkan á arbeiði hjá løgregluni og teimum donsku myndugleikunum, sum umsita økið.

– Hetta er eitt danskt málsøki burturav og Landsstýrið hevur onga ávirkan á arbeiðið hjá løgregluni , sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, nú Jenis av Rana hevur spurt hann, hvussu er vorðið við skøkjulevnaði og striptease í Føroyum

Tað er tí danska fólkatingið og danska lógmálaráðið, sum hava evsta myndugleikan yvir á hesum øki.

Høgni Hoydal vísir á, at samanumtikið er skøkjulevnaður, handil við kvinnum og útbreiðsla av pornografiskum tilfari, bannað í Føroyum.

Men hann leggur afturar, at lóggávan er gomul og hevur ikki verið dagført í samsvari við nýggju fjølmiðla og teldutøknina.

Kortini samtykti Løgtingið einmælt í fjør at seta forboð gildi fyri barnapornografi á alnetinum.

– Viðvíkjandi striptease má fútin gera ein meting í hvørjum einstøkum føri, um talan er um ólógligt virksemi ella ikki, sigur Høgni Hoydal.

Fútin hevur upplýst fyri Høgna Hoydal, at verður eitt ítøkiligt mál um striptease meldað til løgregluna, verður tað kannað á vanligan hátt fyri at vita, um grundarlag er fyri at reisa ákæru í málinum.

Greiðari reglar

Høgni Hoydal sigur annars, at í løtuni verður arbeitt við at yvirtaka bæði løgreglu, rættarskipan og sostatt eisini revsilógina í síni heild

– Í tí sambandi verður eisini viðgjørt, hvussu rættarreglarnar skulu vera í Føroyum, sigur Høgni Hoydal.

Eftir hansara tykki er tørvur á at gera reglarnar og revsingarnar greiðari. Og ikki minst heldur hann, at tað er neyðugt at dagføra lóggávuna í sambandi við ólógligt virksemi tvørtur um landamark, í samabandi við altjóða, skipaðan kvinnuhandil o.s.fr.

Í hesum sambandi eigur útlendingalóggávan og onnur lóggáva eisini at vera dagført.

– Eitt nú hava tiltøk og fyribyrging mótvegis rúsevnum og øðrum, stóran týdning í hesum sambandi, tí samanhangur er ímillum tær umstøður, ið enda við kriminaliteti og misnýtslu á ymsum økjum.

Hann heldur eisini, at nú, vit hava fingið alnet, eiga Føroyar somuleiðis at vera við í altjóða tiltøkum, sum kunnu fyribyrgja kynsligari misnýtslu og handli á hesum øki yvirhøvur.

Hann vísir eisini á, at aðrastaðni verða lógir settar í gildið sum eisini revsað tey, ið keypa tænastur frá skøkjum.

Tað heldur hann er skilagott og hetta eigur eisini at vera tikið við í arbeiðið at gera eina føroyska lóggávu á økinum.

Fyribils avtala gjørd um avloysaraskip fyri Smyril

Tað verður St. Ola úr Estlandi, sum skal avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk beint eftir nýggjár

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
Áki Bertholdsen

Hetta verður ferjan, sum skal sigla fyri Smyril, tá ið hann fer í dokk í januar. Ferjan lýkur tey krøv, sum Strandferðslan setir og skuldi ikki verið verrið enn Smyril

Tað verður estlendska ferjan, St. Ola, sum skal avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk í vetur.

Strandferðslan hevur gjørt ávegis semju við reiðaran í Estlandi, sum eigur ferjuna og nú eru bara smálutir eftir, áðrenn tann endaliga avtalan verður gjørd.

Men Strandferðslan sigur, at tey dugai kki at hugsa sær, at nakað nú skuldi komið í vegin fyri eini endaligari avtalu.

Smyril fer í dokk beint eftir nýggjár og tá kemur St.Ola til Føroyar at sigla ímillum Havnina og Suðuroynna.

– Eftir avtaluna leiga vit St. Ola ferjuna í 75 dagar og leigumálið byrjar ímillum 10. og 30, januar, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

Hann sigur, at leigumálið skuldi laga seg eftir, nær eykalutirnir til Smyril kunnu verða leveraðir frá verksmiðjuni í Japan 8. november.

Sostatt fer Smyril í dokk ímillum 10. og 30 januar, samstundis sum St. Ola kemur til Føroya.

Estlendska ferjan kostar 6.750 evrur um dagin, tað eru umleið 50.300 krónur í okkara peningi.

Tá er flaggskipari og maskinmeistari við, men allar hinar útreiðslurnar til manning, olju o.a. rindar Strandferðslan.

Reidar Nónfjall sigur, hugsað verður fyrst og fremst um at St. Ola skal avloysa Smyril, men møguliga fer hon eisini at verða brúkt til aðra sigling aftaná, um onnur skip skulu í dokk.

Hann sigur, at St. Ola er nú á beding, har hon verður vaskað og málað og yvirhøvur gjørd ístand til at røkja Suðuroyarsiglingina.

Ikki verri enn Smyril

Suðuroyingar hava mangan ilskast inn á tey skipini, sum hava loyst Smyril av, tá ið hann hevur verið í dokk, tí tey hava verið ov vánalig. Men tað verður neyvan støðan hesuferð, tí St. Ola skuldi ikki verið verri skip enn Smyril og hon lýkur øll tey krøv, sum Strandferðslan setir til eina slíka ferju.

Hon hevur siglt í fastari rutu ímillum Scrabster og Stromness á Orknoyggjum og tað er minst líka ringt sum í Suðuroyarfirði og hareftir er ferjan gjørd.

Hon er smíðað í 1971 og hon hevur stabilisatorar bæði aftan og framman.

Hon siglur 16 míl, hon tekur 120 bilar og 500 fólk, hon er góðar 86 metrar long og góðar 16 metrar breið, so munurin ímillum hana og Smyril er ikki stórur.

Annars hevur Smyril havt brek á stabilisatorunum seinastu tíðina, men ein smiðjur skuldi koma til Føroyar fyrr í hesi vikuni at rætta brekið, tí tað var ikki neyðugt at fáa Smyril í dokk til tað.

Sunleif Rasmussen útgivin um allan heim

Stóra svenska plátufelagið BIS hevur júst givið fløguna Surrounded út. Talan er um tónleik hjá Sunleif Rasmussen

TÓNLEIKUR
Ingrid Bjarnastein

Svenska plátufelagið, BIS, hevur nú givið fløgu út hjá Sunleifi Rasmussen. Og týskvøldið móttekur tónaskaldið tónleikavirðisløninа hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum í Helsinki
Mynd: Jens Kr. Vang

Svenska plátufelagið BIS hevur givið út fløguna Surrounded. Á fløguni er tónleikur hjá Sunleif Rasmussen og fløgan verður send út á marknaðin í øllum heiminum.

– Tað er langt síðani, at BIS vísti áhuga fyri mínum tónleiki. Leiðarin í felagnum var í Føroyum í sambandi við frumframførsluna av Oceanic Days, og tá varð longu ein avtala gjørd um at gera eina fløgu, segði Sunleif Rasmussen á tíðindafundi í gjár.

Hetta er fyrsta fløgan við tónleiki hjá Sunleifi, sum verður send út á altjóða marknaðin. BIS gevur fløgur út í Evropa, Norðuramerika, Kanada og í teimum eystaru londunum.

– At fløgan verður send út upp á hendan mátan vil siga, at fleiri fólk koma at kenna mín tónleik. Og bara felagið er longu kent, so tað ger eisini rættiliga nógv, sigur Sunleif Rasmussen.

Tónleikavirðislønin

Í næstu viku skal Sunleif til Helsinki at móttaka tónleikavirðislønina hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Longu í dag, hósdag, fer hann niður til Danmarkar, og har skal hann gera tvær samrøður í sambandi við fløguna. Eisini í Helsinki er áhugin fyri fløguni stórur, tí umframt samrøður í sambandi við tónleikavirðislønina, skal hann gera tríggjar aðrar samrøður sum bara snúgva seg um fløguna.

– Ætlanin var, at fløgan skuldi koma út um eitt ár, men av tí, at eg vann tónleikavirðislønina, skal hann gera tríggjar aðrar samrøður sum bara snúgva seg um fløguna.

– Ætlanin var, at fløgan skuldi koma út um eitt ár, men av tí, at eg vann tónleikavirðislønina, gjørdi felagið av at framskunda útgávuna. Meira enn 70 fløgur standa á bíðilista og bíða eftir at verða givnar út, tí BIS gevur bara millum 12 – 15 fløgur út um árið, greiðir tónaskaldið frá.

Á tíðindafundi mikumorgunin segði Sunleif, at nú var hann so smátt farin at hugsa um tað, at hann skuldi til Finlands at taka ímóti eini tónleikavirðisløn.

– Ja, eg skrivaði takkartalu í gjár. Hon skal sendast víðari, tí hon skal umsetast bæði til finskt og íslendskt, sigur Sunleif smílandi.

Takkartalan skal umsetast, tí sent verður beinleiðis í sjónvarpið, og tá skal tesktur á.

Skráin í Helsinki er longu full. Ella tað ljóðar hon til at vera í øllum førum. Sunnukvøldið gongur leiðin úr Danmark til Helsinki, og mánadagin skulu eini tríggjar ella fýra samrøður gerast. Fyrrapartin týsdagin verður tíðindafundur, og seinnpartin skulu aftur nakrar samrøður fáast undir land hjá fjølmiðlafólkunum. Og týskvøldið verður sjálv handanin og veitslan.

Annars hevur Sunleif Rasmussen rættiliga fitt at gera næstu mánaðarnar. Millum annað skal hann luttaka á tveimum festivalum. Annar verður í Berlin í endanum av næsta mánað. Tað er Magma festivalurin og har verður norðurlendskur tónleikur spældur. Sunleif skal millum annað spæla tónleik av fløguni.

Í byrjanini av desember gongur leiðin til Írlands. Eisini har verður ein festivalur, sum Sunleif skal luttaka á.

Fløgan Surrounded skuldi koma til Føroya í gjárkvøldið, so hon skuldi skjótt staðið á hillunum í sølubúðunum. Fyrsta upplagið lá einastaðni millum 2000 og 3000 fløgur.

Nýggj fløga frá Tutl

Tutl hevur nú givið út fløgu við heitinum Faroeesti. Talan er um føroyskar jazztónleikarar, sum spæla saman við trimum estarum

ÚTGÁVA
Ingrid Bjarnastein

Tutl hevur nú givið út fløguna Faroeesti við føroyskum og estlendskum jazztónleikarum

Bólkurin Faroeesti varð stovnaður í 1992 eftir áheitan frá Norðurlandahúsinum í Føroyum. Ein vitjan varð tá løgd til rættis í Estlandi, og har skuldu millum annað tríggir føroyskir jazztónleikarar gera ein bólk saman við trimum estarum. Bólkurin vitjaði árið eftir í Føroyum, og í 2000 varð samstarvið tikið upp aftur á ferð í Estlandi við bólkinum Shalder.

– Í 2001 varð spælt undir navninum Faroeesti í Tallinn og á stórum festivali í Skt. Pætursborg, sigur Tutl í tíðindaskrivi.

– Samanspælið gekk so mikið væl, at avtala varð gjørd um at gera eina fløgu í 2002, og aftaná tað fáa spælijob á festivalum og klubbum í Norðanlondum, baltisku londunum og møguliga aðrastaðni í heiminum eisini.

Nú Tutl hevur 25 ára føðingardagshald, hevur borið til at fingið stuðul til konsertvirksemið í 2002 og tí koma teir tríggir estararnir til Føroya í mei mánaða.

Tónleikararnir eru: Villu Veski, saxofon, Edouard Akulin, trombon, Heðin Ziska Davidsen, gittar, Kristian Blak, klaver, Jóhannus á Rógvu Joensen, bass og Tanel Rubin, trummur.